umhvørvisstovan

# Umhvørvisgóðkenning

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| **P/F Magn** | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Oljubryggjan við Grótrætt 11, 700 Klaksvík | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| At taka ímóti, goyma og avskipa oljuúrdráttir, serliga gassolju og benzin. | |
| Matr. nr.: | V-tal: |
| 1652u | 321621 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 13/00377-15 | 23-09-2015 |

Argir hin 16/09-2015

Suni Petersen, deildarleiðari

Ingvard Fjallstein, umhvørvisviðgeri

# Innihald

1 Umsóknin ... 3
2 Góðkenning og heimildir ... 3
3 Lýsing av virkseminum ... 3
4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum ... 3
5 Viðgerð ... 3
6 Góðkenningartreytir ... 4
6.1 Almennar treytir ... 4
6.2 Innrætting og rakstur ... 5
6.3 Goymslur og rørskipanir ... 5
6.4 Flutningur av olju ... 8
6.5 Spillluft ... 8
6.6 Spillvatn ... 9
6.7 Óljóð, ristingar og ljós ... 9
6.8 Burturkast ... 10
6.9 Tilbúgving móti dálking vegna óhapp ... 11
6.10 Innaneftirlit og umhvørvisstýrisskipan ... 11
6.11 Rakstarskráseting og umhvørvisfrágreiðing ... 13
7 Kæruvegleiðing ... 14
Fylgiskjal F1. Lýsing av virkseminum ... 15
Fylgiskjal F2. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum ... 16

# 1 Umsóknin

Hin 7. august í 2013 fekk Umhvørvisstovan umsókn um umhvørvisgóðkenning av oljugoymslu við Grótrætt í Klaksvík frá Magn P/F, Tórshavn, hereftir nevnt Magn. Eftir áheitan frá Umhvørvisstovuni hevur Magn sent ískoytistilfar til umsóknina hin 8. januar 2014. Harafturat hevur Umhvørvisstovan hin 3. februar 2015 fingið ískoytistilfar um útbygging av tangagørðunum hjá Magn við Grótrætt.

# 2 Góðkenning og heimildir

Henda umhvørvisgóðkenning av Oljugoymslum við Grótrætt í Klaksvík hjá Magn, á matr. nr. 1652u, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 við seinni broytingum, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja og avmarka ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

# 3 Lýsing av virkseminum

Magn við Grótrætt í Klaksvík tekur ímóti gassolju og benzini frá tangaskipum og veitir gassolju til skip. Harafturat hevur Magn oljugoymslu og pumpustøð til tangabilar.

Nærri lýsing av virkseminum í Fylgiskjali F1.

# 4 Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Niðanfyri er ein lýsing av umhvørvisviðurskiftunum í mun til virksemið hjá Magn við Grótrætt við ábendingum um treytir, sum kunnu vera settar til virksemið. Tær endaligu ásettu treytirnar eru í kap. 6.

Oljugoymslan hjá Magn við Grótrætt er í Øki B14, vinnuøki (ídnar-, góðs-, olju- og ferðavinnuøki), sum sambært byggisamtyktini loyvir virksemi, sum henda góðkenning viðvíkur.

Nærri lýsing av virkseminum í Fylgiskjali F2.

# 5 Málsviðgerð

Í viðgerðini av umsóknini og til áseting av treytum er m. a. hetta tilfar nýtt:

- Umsókn dagfest 7. august 2013
- Ískoyti til umsókn dagfest 16. januar 2014
- Ískoyti til umsókn dagfest 3. februar 2015
- Vejledning om miljøkrav til store olieoplag, Miljøstyrlesen 2/2011
- Olieudskilleranlæg, Teknologisk Institut, 2004

Í málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at dálkandi evni ikki verða leidd út á vágna og umhvørvið annars,
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær, verður minkaður mest møguligt,
- at mannagongdir at fyribyrgja dálkandi óhappum vera tøkar,
- at útgerð til handfaring av dálkandi óhappum skal vera tøk,
- at innaneftirlit, umhvørvisstýriskipan og skrásetingar eru sambært viðurkendum skipanum,
- at besta tøka tøknin, sambært BAT-hugtakinum, verður nýtt í mest møguligan mun.

Allar viðkomandi treytir verða settar upp í Kap. 6 Góðkenningartreytir, eisini treytir virksemið longu lýkur.

Eitt uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent Magn til viðmerkingar 22. desember 2014. Magn kom við viðmerkingum 19. januar 2015, Umhvørvisstovan svaraði viðmerkingunum 24. apríl og Magn svaraði aftur upp á hesar viðmerkingarnar 18. mai 2015. Frammanundan hevði Magn havt teknisku lýsingina og umhvørvislýsingina av virkseminum við Grótrætt til viðmerkingar.

Endaligt uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent Magn og Klaksvíkar kommunu til viðmerkingar tann 1. juli 2015. Magn hevði ongar týðandi viðmerkingar og Klaksvíkar kommuna hevði ongar viðmerkingar til uppskot um umhvørvisgóðkenning.

# 6 Góðkenningartreytir

## 6.1 Almennar treytir

6.1.1 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

6.1.2 Allar sýnistøkur og kanningar v.m. sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini skulu gerast av óheftum stovni ella felag, sum hevur førleika og útgerð at gera arbeiðini.

6.1.3 Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av Magn.

6.1.4 Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

6.1.5 Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið steðgar, skal alt leyst tilfar og útgerð uttandura beinast burtur.

6.1.6 Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

6.1.7 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.

6.1.8 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

6.1.9 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

6.1.10 Í seinasta lagi tríggjar mánaðir fyri at raksturin av virkseminum, sum hevur fingið hesa góðkenning, heldur uppat, skal Magn senda Umhvørvisstovuni eina frágreiðing um, hvussu Magn ætlar at rigga útgerðina av.

6.1.11 Í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir, at omanfyri nevndi rakstur er hildin uppat, skal Magn senda Umhvørvisstovuni eina váttan upp á, hvussu tangar, rørleiðingar og oljuúrskiljarar eru avriggað.

## 6.2 Innrætting og rakstur

6.2.1 Virkið skal vera staðsett, bygt og rikið, sum sagt er frá í umsóknini og øðrum móttiknum tilfari.

6.2.2 Øll økir, har olja verður umskipað ella goymd, skulu vera gjørd úr tilfari, sum tolir olju og er oljutætt.

6.2.3 Øll økir, har olja verður umskipað ella goymd, skulu vera gjørd ella skipað soleiðis, at tey halda oljuspilli, sum stavar frá lekum ella óhappum, inni á viðkomandi øki.

6.2.4 Øll økir, har olja ella oljuúrdráttir vera goymd í smærri íløtum, skulu vera væl skipað og ruddilig.

6.2.5 Økið kring Ventilhús skal skipast soleiðis, at oljuspill millum hús og bryggjukant verður hildið aftur.

6.2.6 Øll øki, har olja verður umskipað ella goymd, skulu hava lokað frárensl við hóskandi reinsiskipanum, trygdarskipanum og ávaringarskipanum.

6.2.7 Arbeiði, har vandi er fyri spilli av dálkandi ella vandamiklum evnum, skal gerast á skynsaman hátt soleiðis, at dálking ikki stendst av hesum.

## 6.3 Goymslur og rørskipanir

*Oljutangar (Øki 2 og 3)*

6.3.1 Oljutangar skulu standa á lendi og í garði, sum heldur spilli ella lekum av olju aftur.

6.3.2 Oljugoymslutangar skulu hava ein hóskandi lit, sum gevur lítla upphiting av sólarljósi.

6.3.3 Oljugoymslutangar skulu hava tøkniliga skipan, sum alla tíðina mátar, hvussu nógv olja er í tangunum, og sum boðar frá, um oljustøðan verður ov høg, ov lág ella lækkar ov skjótt. Harafturat skal oljunøgdin kunna mátast við hond.

6.3.4 Oljugoymslutangar skulu eisini hava óhefta skipan, sum boðar frá, um oljustøðan verður ov høg.

6.3.5 Ávaringarskipanirnar skulu boða frá á eftilitsstøðum og t.d. við ljóði ella ljósi, sum sæst ella hoyrist við móttøkuna ella oljutangarnar so mikið tíðliga, at tíð er til at steðga flutningi av olju, áðrenn olja flýtur yvir.

6.3.6 Streymveiting til oljupumpur skal kunna brótast av við pumpurnar, við Ventilhúsið og við Lessistøðina.

6.3.7 Tangavatn verður tikið úr goymslutangunum og koyrt í settlingstanga undir eftirliti og oljuparturin verður pumpaður inn aftur í oljutangan.

6.3.8 Allar rørleiðingar til olju skulu verða gjørdar soleiðis, at tað skal vera møguligt at hava eftirlit við lekum, og at savna olju frá møguligum lekum.

6.3.9 Kontraventilur skal vera á uppskipingarrørleiðingunum og sjálvvirkandi lokaventilar á avskipingarrørleiðingum.

6.3.10 Allar týðandi rørleiðingar skulu kunna latast upp ella aftur við handakraft.

6.3.11 Tangagarður kring bensintanga skal í minsta lagi rúma 1,1 ferðir rúmdina av tí størsta tanganum.

6.3.12 Tangagarður kring gassoljutangar skal í minsta lagi rúma 1,1 ferðir rúmdina av tí størsta tanganum í seinasta lagi 31. desember 2016.

6.3.13 Ventilur til at tøma regnvatn úr tangagarði skal altíð vera stongdur. Eftirlit skal vera við, tá tangagarðurin verður tømdur og opin ventilur má ikki loyva størri vatnnøgd ígjøgnum, enn oljuskiljari alla tíðina kann viðgera.

6.3.14 Oljuúrskiljari við bæði ventili við sjálvvirkandi læsing og ávaringarskipan, kann vera á frárenslinum frá Øki 2 og Øki 3 í staðin fyri áseting í pkt 6.3.13, um Magn kann vísa á, at ávaringarskipanin er álítandi, eisini uttanfyri vanliga arbeiðstíð, og læsingin er oljutøtt.

6.3.15 Tangar, pumpustøðir og rørleiðingar skulu vera tryggjað ímóti, at akfør kunnu koyra á tey ella av at vera rakt av gróti og øðrum, sum kann losna úr lendinum omanfyri.

6.3.16 Tangar og rørleiðingar skulu verjast ímóti tæring.

6.3.17 Rørleiðingar, ventilar, pumpur og tilíkt, sum ikki verða brúkt, skulu takast niður og øll eftirverandi op skulu tippast.

6.3.18 Tá rør, sum liggja í lendinum, skulu skiftast, skulu tey leggjast í betongrennu ella tilsvarandi verju. Betongrennan skal góðkennast av Umhvørvisstovuni.



Umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

*Aðrar goymslur (Øki 5 og Øki 6)*

6.3.19 Oljuúrdráttir og kemikalii skulu goymast soleiðis, at óviðkomandi ikki hava atgongd til goymslurnar.

6.3.20 Magn miðar eftir, at Uttanduraøkið (Øki 5) skal skipast soleiðis, at so lítið økið sum gjørligt verður dálkað í sambandi við spill ella óhapp.

6.3.21 Uttanduragoymslur til oljuúrdráttir skulu standa á lendi, sum kann halda lekum og spilli frá umskiping ella óhappum aftur inni á goymsluøkinum, svarandi til minst 1,1 ferðir nøgdina í størsta ílatinum.

6.3.22 Ventilur til at tøma regnvatn av Øki 5 við olju skal altíð vera stongdur. Eftirlit skal vera við, tá økið verður tømt.

6.3.23 Oljuúrskiljari við bæði ventili við sjálvvirkandi læsing og ávaringarskipan, kann vera á frárenslinum frá Øki 5 í staðin fyri áseting í pkt 6.3.23, um Magn kann vísa á, at ávaringarskipanin er álítandi, eisini uttanfyri vanliga arbeiðstíð, og læsingin er oljutøtt.

6.3.24 Uttanduragoymslur (Øki 5) til kemikalii skulu standa á lendi, sum kann halda lekum og spilli frá umskiping ella óhappum frá viðkomandi evnum aftur, svarandi til minst 1,1 ferðir nøgdina í størsta ílatinum.

6.3.25 Ventilur til at tøma regnvatn av Øki 5 við kemikalii skal altíð vera stongdur. Eftirlit skal vera við, tá økið verður tømt.

6.3.26 Óviðkomandi ferðsla skal ikki vera á Øki 5.

6.3.27 Aðrar goymslur uttandura skulu skipast soleiðis, at vørur, tilfar ella útgerð ikki verða tikin av vindi.

6.3.28 Innanduragoymslur (Øki 6) skulu hava gólv, sum tola oljuúrdráttir og kemikalii, uttan frárensl til spillvatnsleiðing og vera skipaðar soleiðis, at útlát vegna lekar ella óhapp kunnu haldast aftur á gólvinum ella í tanga uttan frárensl.

6.3.29 Gólvið ella tangin frá innandura goymslu skal kunna rúma nøgdini av oljuúrdráttum ella kemikalium, sum kann vera í tí størsta ílatinum á staðnum.

6.3.30 Innanduragoymslur skulu hava hóskandi luftskifti í mun til evnini í goymsluni.

6.3.31 Ein hóskandi nøgd av olju- ella kemikaliisúgvandi tilfari skal altíð vera tøk, har olja ella kemikalii vera goymd í smærri íløtum.

6.3.32 Olju- ella kemikialiileivdir skulu í størst møguligan mun takast upp við súgvandi tilfari ella á annan hátt, áðrenn gjørt verður reint.

6.3.33 Spillvatn við sápu ella oljuemulgerandi evnum frá uttandura goymslum skal ikki leiðast ígjøgnum oljuúrskiljarar.



**Umhvørvis**stovan·· Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

## 6.4 Flutningur av olju

6.4.1 Greiðar mannagongdir skulu vera um at fylla á tangar, tangabilar og í onnur íløt, sum m.a. innihalda ábyrgdarbýti, útgerð, eftirlitslistar og annað av týdningi.

6.4.2 Øll uppskiping av olju millum tangaskip og oljugoymslur og øll avskiping av olju frá oljugoymslum til skip skal gerast soleiðis, at tey í minsta lagi lúka treytirnar í Kunngerð nr. 84 í 2010 um bunkring, flutning av olju o.a.

6.4.3 Tá Magn tekur ímóti olju frá skipi ella veitir olju til skip, skulu ábyrgdarpersónar vera bæði hjá móttakara og veitara, meðan olju verður flutt. Hesir skulu kunna samskifta beinleiðis, um neyðugt, umvegis hóskandi samskiftisútgerð.

6.4.4 Ventilur á frárensli frá tangagarði (Øki 2 og 3) skal vera stongdur, meðan olja verður fylt á tangarnar, uttan mun til, um sjávvirkandi ventilur er á frárenslinum.

6.4.5 Endarnir á innføringsrørunum til goymslutangarnar á Øki 2 og Øki 3 skulu í høvuðusheitum vera undir, tá olja verður pumpað inn.

6.4.6 Serstakt eftirlit skal vera við oljuleiðing á Øki 1 millum skip og Ventilhús.

6.4.7 Áðrenn áfylling byrjar, skal kannast, um øll rør og allar slangur eru trygg, og at allir ventilar eru í rættari støðu.

6.4.8 Fyri hvønn einstakan tanga, sum olja skal fyllast á, skal innihaldið vera mált, og avtala gjørd um, hvussu nógv olja skal fyllast á, áðrenn áfylling byrjar.

6.4.9 Áfylling skal steðgast beinanvegin, um tekin eru um, at áfyllingin ikki fer fram trygt, forsvarliga og sambært avtalaðum mannagongdum, t.d. um radiosamband millum veitara og móttakara gerst óvirkið, tekin eru um ovfylling, skaða á útgerð, ella annað óvæntað.

6.4.10 Hóskandi útgerð at avmarka og basa dálking skal vera á staðnum.

## 6.5 Spillluft

6.5.1 Virksemið má ikki hava við sær ampar av lukti, dusti ella royki uttanfyri øki virkisins.

6.5.2 Allar útleiðingar til luft skulu leiðast uppeftir.

6.5.3 Skorsteinur frá oljufýring skal røkka í minsta lagi ein metur upp um tekju.

6.5.4 Spillluftin frá oljutangum skal halda hesi markvirði:

| Evni | Áseting | B-virði |
|---|---|---|
| VOC | 100 mg/m3 | 0,1 mg/m3 |



Umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

## 6.6 Spillvatn

6.6.1 Magn skal at reinsa spillvatni[1] frá virkseminum soleiðis, at evni og tilfar í størst møguligan mun verða hildin aftur.

6.6.2 Alt spillvatn, sum kann innihalda mineralska olju, skal gjøgnum hóskandi reinsiskipan, so sum botnfellingartanga og oljuúrskiljara við sjálvvirkandi læsing og endurtakandi ávaring um tjúkd av oljulagi, hækkandi og lækkandi vatnstøðu ella aðra hóskandi skipan.

6.6.3 Sýnistøkubrunnur skal vera aftan á hvørja einstaka reinsiskipan.

6.6.4 Frárenning frá virkinum má ikki bera brá av olju ella aðrari dálking.

6.6.5 Spillvatn skal leiðast í kommunala spillivatnsskipan.

6.6.6 Um kommunal spillivatnsskipan ikki er tøk, skal spillvatn leiðast út á sjógv, har rákið førir spillvatnið úr landi, og har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingar hvørki elva til uppsavning av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum.

6.6.7 Munnin á spillvatnsútleiðing skal í minsta lagi verða ein metur undir størstu fjøru.

6.6.8 Elvir spillvatnsútleiðing til uppsavning av evnum og tilfari í sjóarmála ella á botni, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skulu bøtandi atgerðir fremjast, so sum økt reinsing. Umhvørvisstovan skal kunnast um ætlaðar atgerðir.

6.6.9 Talið av útleiðingum á sjógv skal vera so lágt sum gjørligt.

6.6.10 Spillvatnið kann í mesta lagi innihalda 10 mg/L av mineralskari olju (DS/R 208 ella tilsvarandi mannagongd).

## 6.7 Óljóð, ristingar og ljós

6.7.1 Magn skal avmarka og doyva óljóð frá virkseminum.

6.7.2 Magn og beinleiðis atknýttir undirveitarar skulu brúka so ljóðveik og ljóðmeinaleys arbeiðstól og flutningsakfør sum gjørligt.

6.7.3 Magn hevur ábyrgd av, at bil- og trukkførarar og skipleiðslur arbeiða so ljóðskynsamt sum gjørligt.

6.7.4 Ískoytið til óljóðstyngdina við næsta grannamark frá virkseminum hjá Magn og beinleiðis avleiddum virksemið, má ikki fara upp um niðanfyri standandi mørk:

---

[1] Spillvatn er regnvatn og vatn, sum verður brúkt til at spula og gera reint við, og vatn sum hevur verið beinleiðis í sambandi við framleidda vøru, burturkast ella er dálkað av øðrum ávum.

| Dagur | Klokkutíð | Tímar | Øki 1 dB(A) | Øki 2 dB(A) | Øki 3 dB(A) | Øki 4 dB(A) |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Mánadag til fríggjadag | 07-18 | 8 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 07-14 | 7 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 14-18 | 4 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Sunnu- og halgidagar | 07-18 | 8 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 18-22 | 1 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22-07 | 0,5 | 70 | 60 | 40 | 35 |
| Hámarksvirði | 22-07 | | | | 55 | 50 |

Óljóðtyngdin: Óljóðstøðið, mált sum orkujavnað, A-vigað ljóðtrýststøði í dB(A) við næsta grannamark

Tímar: Miðal óljóðstyngdin fyri teir mest larmandi samanhangandi tímarnar í einum samdøgurstíðarskeiði, má ikki fara upp um markvirðið, t.d. má miðalvirði fyri 8 samanhangandi dagtímar (kl. 07-18) ikki fara upp um 45 dB(A) fyri Øki 4.

Øki 1: Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram

Øki 2: Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram

Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki

Øki 4: Bústaðarøki

6.7.5 Alt virksemið skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur ampar av ristingum og ljósi við sær.

**6.8 Burturkast**

6.8.1 Alt burturkast frá virkseminum hjá Magn skal handfarast og skiljast í samsvari við kunngerð[2] um burturkast og galdandi reglum hjá móttakara.

6.8.2 Alt burturkast skal latast virki, sum hevur umhvørvisgóðkenning til at taka ímóti burturkasti og viðgera tað.

6.8.3 Burturkast skal altíð goymast í hóskandi íløtum ella bingjum, og ikki vera til ampa ella elva til dálking.

6.8.4 Serliga dálkandi burturkast skal skiljast og handfarast sambært galdandi reglum og goymast í týðiliga merktum hóskandi íløtum, t.d. UN-góðkendum íløtum.

6.8.5 Íløt við serliga dálkandi burturkasti skulu vera tøtt og standa á einum sjálvstøðugum og avbyrgdum tøttum øki samsvarandi kap. 6.3.

6.8.6 Bingjur, íløt og burturkast, sum ikki kann vera í íløtum, skulu verða sett og tryggjað soleiðis, at tey ikki fúka í vindi.

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19.10.1995 um burturkast.

**6.9 Tilbúgving móti dálking vegna óhapp**

6.9.1 Magn skal gera eina váðameting av óhappum, sum kunnu føra til brádliga økta dálking innan 1. juli 2016.

6.9.2 Við støði í váðametingini skal Magn ráða yvir ella hava avtalu um hóskandi útgerð til at steðga útláti og at taka upp eftir útláti, so umhvørvisligu árinini vera so smá sum gjørligt.

6.9.3 Út frá váðametingini skal Magn gera eina tilbúgvingarætlan við mannagongdum at fyribyrgja óhappum og at steðga og avmarka útláti á rættan og skjótan hátt um óhapp skuldi hent.

6.9.4 Umhvørvisstovan skal skjótast gjørligt hava boð um óhapp, sum hava brádliga økta dálking við sær. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk, tiltøk til at basa og taka upp eftir bráðfeingis dálking og tiltøk, sum eru sett í verk fyri at tryggja, at líknandi óhapp ikki kemur fyri aftur, sendast Umhvørvisstovuni.

6.9.5 Avrit av tilbúgvingarætlan skal sendast til Umhvørvisstovuna í seinasta lagi 12 mánaðir eftir, at góðkenningini er lýst.

**6.10 Innaneftirlit og umhvørvisstýriskipan**

6.10.1 Magn skal altíð tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.

*Goymslur og útgerð*

6.10.2 Magn kannar nøgdina av gassolju og bensini í goymslutangunum hvønn dag. Um kanningin vísir eina gongd, har minni er í einum tanga enn væntað í mun til uppskiping, avskiping, hitabroytingar og mátióvissu, skal kannast hvør orsøk kann vera til mangulin og neyðug tiltøk setast í verk.

6.10.3 Magn skal hava mannagongdir til regluligt og hóskandi eftirlit við oljutangum, oljurør-leiðingum, ventilum, pumpum, ávaringarskipanum, tangagarði og oljurørkanalum fyri at tryggja, at óhapp ikki henda og at krøvini til útlát verða hildin bæði í vanligum rakstri ella um óhapp henda.

6.10.4 Magn skal hava innanhýsis vikuligt og uttanhýsis kvartárligt eftirlit av tangum og útgerð á Øki 2 og 3 og mannagongdir til skráseting og viðlíkahald av hesum.

6.10.5 Eftirlit við goymslutangunum á Øki 2 og 3, har tangarnir verða kannaðir innaní og uttaná, skal vera fimta hvørt ár. Umhvørvisstovan kann geva loyvi til at víkja frá tíðarætlanini.

6.10.6 Frágreiðing við upplýsingum um tangaeginleikar, kanningarhátt, mátingar og staðfestingar, meting av tangastøðu, tilmæli um átøk og ætlaða nýggja kanning skal gerast eftir kanningina.

6.10.7 Oljurørleiðingar millum goymslur og ávikavist Ventilhús og Lessistøð skulu kannast einaferð um árið til tess at staðfesta, at teir eru tættir.

6.10.8 Nevndu eftirlit skulu gerast av óheftum persóni ella virki, sum hevur neyðugam førleika og útbúna at gera arbeiðini.

6.10.9 Slangur til uppskiping ella avskiping av olju skulu goymast, handfarast, kannast og roynast sambært leiðbeining frá veitara. Minst einaferð um árið skal tó kannast, um hesar slangur eru tættar.

6.10.10 Magn skal hava mannagongdir til regluligt eftirlit ella roynd, tó í minsta lagi einaferð um árið, við reinsiskipanum, uppsamlingarbrunnum, mátiskipanum, ávaringarskipanum, sjálvvirkandi ventilum og øðrum ventilum, so hesi virka sambært ætlanum ella forskriftunum.

*Spillluft*

6.10.11 Um ampar eru av lukti, dusti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Umhvørvisstovan kann góðtaka.

*Spillvatn*

6.10.12 Fyrstu trý árini skal Magn taka fýra sýnir av spillvatninum um árið, meðan tað regnar meira enn miðal. Sýnini skulu takast javnt býtt ígjøgnum árið og kannast sambært 6.6.11.

6.10.13 Magn skal hava skil á, hvussu nógv spillvatn verður leitt út.

6.10.14 Um Magn metir, at onnur dálkandi evni kunnu vera í spillvatninum enn tey, sum eru nevnd í 6.6.11, hevur virkið skyldu til at kanna hesi og boða Umhvørvisstovuni frá úrslitunum í seinasta lagi ein mánað eftir at kanningin er tøk.

6.10.15 Eftir trimum árum kann Magn søkja um at fáa títtleikan av sýnistøkum og kanningum broyttan.

*Óljóð*

6.10.16 Um ampar verða av óljóði, ristingum ella ljósi, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Umhvørvisstovan kann góðtaka.

*Kanningar og frágreiðingar*

6.10.17 Magn ger eina kanningar- og eftirlitsskrá fyrst í hvørjum ári og sendir Umhvørvisstovuni eitt avrit av henni í seinasta lagi 1. februar. Um ikki ber til at áseta fastar kanningardagar innan 1. februar, skal Magn boða Umhvørvisstovuni frá um kanningar í seinasta lagi tríggjar arbeiðsdagar frammanundan.

6.10.18 Magn eftirmetir skrivliga øll eftirlit og allar kanningar.

6.10.19 Mannagongdir, rakstrarskrásetingar, kanningarúrslit og frágreiðingar skulu goymast í fimm ár og vera atkomuligar hjá eftirlitsmynduleikanum. Tó skulu frágreiðingar frá eftirliti av tangum goymast, so leingi tangin er í brúki.

6.10.20 Umhvørvisstovan kann krevja, at Magn ger serstakar metingar, kanningar ella mátingar, um ábending er um serliga dálking ella fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.



Umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

6.10.21 Magn kunnar Umhvørvisstovuna um niðurstøðurnar í øllum omanfyrinevndu kanningum, frágreiðingum og ætlanum í minsta lagi einaferð um árið.

6.10.22 Um ein kanning ella frágreiðing vísir, at Magn ikki heldur ásetingarnar í hesi góðkenning ella vísir, at vandi er fyri brádligari dálking, skal Magn í seinasta lagi eina viku eftir, at tílík kanning ella frágreiðing er fingin til vega, senda Umhvørvisstovuni avrit av kanning ella frágreiðing, og í seinasta lagi ein mánað eftir, at kanning ella frágreiðing er fingin til vega senda Umhvørvisstovuni ætlan við bøtandi atgerðum.

*Umhvørvisstýriskipan*

6.10.23 Magn skal seta í verk eina umhvørvisstýriskipan, sum hevur mannagongdir til stýring av virksemi, dálkingaravmarkandi tiltøkum, viðlíkahaldi, skráseting o.ø.

6.10.24 Um umhvørvisstýriskipanin ikki verður skoða av óheftum persóni ella virki, skal Magn tryggja, at skipanin verður eftirmett í minsta lagi einaferð um árið.

6.10.25 Umhvørvisstovan kann krevja avrit at umhvørvisstýriskipanini.

## 6.11 Rakstarskráseting og umhvørvisfrágreiðing

6.11.1. Magn skal skráseta hesar upplýsingar:

- allar uppskipingar og avskipingar av gassolju og bensini,
- dagligt eftirlit við nøgdini av gassolju og bensini sambært 6.10.2,
- nýtsla av kemikalium, íroknað reingerðarevni og sóttreinsingarevni,
- nøgdir og slag av burturkasti, íroknað vandamikið burturkast og evju úr reinsiskipanum v.m., og tilhoyrandi móttakari,
- eftirliti av tangum til gassolju og bensini og tilhoyrandi rørskipanum og tilhoyrandi viðlíkahaldi,
- eftirlit, roynd og viðlíkahald av reinsiskipanum til spillvatn,
- kanningarúrslit av tiknum sýnum av spillvatni,
- dálkandi óhapp ella næróhapp, orsøk og frágreiðing um árin og upprudding v.m.

6.11.2. Magn ger hvørt ár eina umhvørvisfrágreiðing sum í minsta lagi inniheldur:

- uppgerð av rakstrarskrásetingunum,
- uppgerð av samlaðum útlátum av kannaðum evnum,
- kanningarúrslit og viðkomandi tulking av úrslitum,
- dálkandi óhapp,
- frágreiðing um umhvørvisskipan og umhvørvisviðurskifti,
- gjørd og ætlað umhvørvistiltøk o.a.

sum skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum.